VINNUSÍÐURNAR
BLAÐIÐ við føroysku VINNU niðurstøðunum

# 21 ára gamal føroyingur eigur

**Fyri hálvum triðja ári síðan stovnaði Gilli Haraldsen, sum er ættaður úr Sandavági, felagið Haraship. Í dag hevur felagið 7.000 fólk í einum databasa, ið tey kunnu bjóða út sum arbeiðsmegi – í fyrsta lagi við atliti til sjóvinnu. – Eg byrjaði einsamallur, og tað vóru foreldrini hjá mær, sum hjálptu mær í gongd fíggjarliga. Tey veðhildu fyri meg, men tann peningurin er langt síðan goldin aftur, sigur ungi maðurin smílandi**

FRAMTAKSHUGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Gilli Haraldsen eigur sjálvur felagið, Haraship, men við tað, at hann er so ungur og tí kann hava torført við at vinna sær álit í ymiskum samráðingarstøðum, hevur hann sett 49 ára gamla, Niels Maindal, sum virkandi stjóra í felagnum. - Niels hevur verið skipsmeklari og starvsfólkaleiðari í fleiri ár, sigur ungi sandavágingurin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Haraship er ein spennandi fyritøka í Fredrikshavn í Danmark, sum tann bert 21 ára gamli føroyingurin, Gilli Haraldsen, eigur.

Í 1989 fluttu foreldur hansara, Eiler Haraldsen, sum er úr Sandavági og Guðrið Haraldsen, sum er ættað úr Havn, niður til Hirtshals at búgva.

– Eg sleit mínar barnaskógvar í Sandavági, og tí føli eg meg sum sandaváging.

Gilli sigur, at familjan setti seg niður í Tornby, nær við Hirtshals, haðani pápin eitt nú hevur siglt sum stýrimaður við donskum nótabátum.

– Eg tók eina HTX-útbúgving og fór síðan á handilsskúla í eitt ár, sigur ungi sandavágingurin.

## Stovnaði Haraship

Fyri hálvum triðja ári síðan stovnaði Gilli felagið, Haraship, sum hann í byrjanini rak heimanífrá.

– Eg byrjaði einsamallur, og tað vóru foreldrini hjá mær, sum hjálptu mær í gongd fíggjarliga. Tey veðhildu fyri meg, men tann peningurin er langt síðan goldin aftur, sigur hann smílandi.

Gilli vísir á, at hann brúkti allan peningin, sum hann í byrjanini lænti, til at marknaðarføra felagið við.

– Í lýsingum segði eg frá, at fiskimenn og sjófólk annars kundu venda sær til mín fyri at fáa kjans við skipi – og samstundis vistu reiðaríir og skiparar, at tey eisini kundu venda sær til mín fyri at vita, um vit høvdu fólk tøk til leys størv. Soleiðis byrjaði hetta arbeiði, greiðir Gilli Haraldsen frá.

Skjótt fekk hann sær eisini heimasíðu, har reiðaríir, skiparar og onnur kundu boða frá, at teimum vantaðu fólk, eins og sjófólk kundu boða frá, at tey vóru tøk.

– Skipanin er á leið hin sama í dag. Vit hitta hvønn einstakan persónliga sum søkir kjans, og vit kanna eftir, hvørjar kvalifikatiónir og royndir viðkomandi hevur. Vit kenna eisini reiðaríini og skipararnar og vita, hvat tey hava brúk fyri.

Gilli hevur ikki verið so lítið umrøddur í donskum bløðum í seinastuni, har hann eitt nú verður nevndur tann ungi "fredrikshavnarin".

Tann eina greinini, sum Sosialurin hevur fingið hendur á, kallast: "21 årig komet indenfor maritim management". Í undirtekstinum til greinina stendur: "Ungt firma í Fredrikshavn på verdenskortet med søforhyring, maritimt arbejdsmiljø og maritim nyhedsformidling".

Í dag hevur Haraship skrivstovuhølir uppat havnini í Fredrikshavn og umframt Gilla, eru trý fólk í starvi hjá felagnum. Haraftrat hevur felagið seljarar, sum verða løntir við provisjón. Í hesum sambandi er serliga talan um AirSep-skipanina til vernd av umhvørvinum og sparingum í smyrjoljunýtslu í motorum. Haraship er eisini við í altjóða netverki, sum hevur fleiri skrivstovur og umboðsfólk kring um í heiminum.

## Ov ungur…

Sosialurin hitti Gilla, tá ið hann var heima í Føroyum í heyst, og tá segði hann, at felagið leitaði eftir eini føroyskari skrivstovukvinnu, sum ætlandi skal byrja á skrivstovuni fyrst í nýggja árinum.

Gilli eigur sum nevnt sjálvur Haraship, men við tað, at hann er so ungur og tí kann hava torført við at vinna sær álit í samráðingarstøðum, hevur hann sett 49 ára gamla, Niels Maindal, sum virkandi stjóra í felagnum.

– Niels hevur verið skipsmeklari og starvsfólkaleiðari í fleiri ár, sigur sandavágingurin.

Hann sigur, at Haraship í miðal fær eini 200 fólk umborð á donsk skip um árið.

– Reiðaríir og skiparar vilja hava dugnalig fólk umborð á skipini, og har tørvur er á tí, skipa vit eisini fyri skeiðum í samstarvi við eitt nú reiðaríir, arbeiðsávísingina og lokalar lærarakreftir við atliti til sjóvinnu.

Gilli sigur, at Haraship hevur tætt tilknýti til heimsumfatandi felagið, Ocean Wide, sum hevur høvuðssæti í Hálandi, men hevur skrivstovur um stóran part av heiminum.

– Hetta felag arbeiðir eisini við at bjóða út sjófólk og manningar. Tað var Ocean Wide, sum setti seg í samband við okkum fyri at koma inn á danska marknaðin. Burtur úr hesum spurdist ein samstarvsavtala, soleiðis at vit nú eisini eru "koblaðir" inn á databasan hjá teimum, sigur Gilli.

## Crew Management

Í høvuðsheitum arbeiðir felagið á fýra økjum, har tann parturin, sum nevnist Crew Management, er hin størsti. Her hevur felagið 7.000 fólk í einum databasa, sum øll eru dugnalig á sínum øki innan sjóvinnu av ymiskum



*– Reiðaríir og skiparar vilja hava dugnalig fólk umborð á skipini, og har tørvur er á tí, skipa vit eisini fyri skeiðum í samstarvi við eitt nú reiðaríir, arbeiðsávísingina og lokalar lærarakreftir við atliti til sjóvinnu, sigur Gilli*

*Myndin er tilvildarlig*